ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

# Fulltrúi til Heilsumálaráðið

Eitt farloyvisstarv, sum fulltrúi í Heilsumálaráðnum, er leyst at søkja í tíðarskeiðinum 1. juni 2011 til 31. mai 2012.

Sum fulltrúi Heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar m.a., at tilevna lógaruppskot og uppskot til kunngerðir á heilsuøkinum, at svara fyrispurningum frá løgtinginum, og at tulka lógir og reglur fyri stovnar undir Heilsumálaráðnum. Uppgávurnar eru áhugaverdar og fjølbroyttar. Talan er um starv í einum spennandi politiskum arbeiðsumhvørvi, og skalt tú vera før/ur fyri at kunna arbeiða undir einum ávísum trýsti.

**Førleikar**
Tú hevur samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni, t.d. løgfrøðingur, stjórnmálafrøðingur, ella búskaparfrøðingur. Lesandi, sum eru um at gera útbúgving sína lidna, eru eisini vælkomin at søkja starvið. Tú skalt duga væl at orða teg á føroyskum, bæði í skrift og í talu, og er tað ein fyrimunur, um tú hevur politiskt tev og áhuga fyri samfelagsviðurskiftum sum heild.

Starvið er mennandi og við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Hóast starvið er sjálvstøðugt, og ábyrgdin stór, so verða uppgávurnar loystar í samstarvi við aðrar starvsfelagar í ráðnum, eins og saman við leiðandi løgfrøðinginum í ráðnum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til:
Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
FO-100 Tórshavn.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 2. mai kl. 12:00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, tlf. 30 40 50 og poul.geert.hansen@hmr.fo

Heilsumálaráðið umsitur heilsumál, herundir sjúkrahúsverkið, apoteksverkið og primeru heilsutænastuna, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika.

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ • EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN
TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

INPACT

# BÓKHALDARI

Fyri ein av kundum okkara í Suðuroy verður hervið søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber. Talan er um 1/2 ella 3/4 tíðarstarv.

**Høvuðsuppgávan:**
Tann, sum settur verður í starv kemur at hava ábyrgdina av bókhaldinum. Virksemið umfatar rakstur av fiskiskipum. Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhaldsarbeiði, herundir avrokning av hýrum. Arbeitt verður við bókhaldsskipanini Lundin, herundir avrokningarskipanini til hýruavrokning.

**Førleikakrøv:**
Ongar serligar treytir verða settar til útbúgving, men umsøkjarar við hesum royndum hava fyrimun :

- Royndir at arbeiða við bókhaldsskipanini Lundanum og avrokningarskipanini
- Góðan kunnleika í nýtslu av kunningartøkni
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt

**Setanartreytir:**
Starvstreytirnar verða ásettar eftir avtalu millum tann, sum verður settur og leiðsluna.

**Umsókn:**
Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
Stílað: Fróði Sivertsen
Postrúm 191
FO-110 Tórshavn
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. apríl 2011.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Fróða Sivertsen, statsaut. revisor, Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT. tlf. nr. 554725 ella teldupostadr.: fs@inpact.fo



# Forrkela teg og tíni !!

Hvat við Gimbrastovu við Ljósá ?

Nýggjar myndir eru á heimasíðuni

www.ognir.fo

lp@ognir.fo
Tlf. 217300

Starvslýsing

Leys størv

## Bólkaleiðari til Eldrasambýlini í Kollafirði og Oman Hoydalar

Søkt verður eftir bólkaleiðara til Eldrasambýlini í Kollafirði og Oman Hoydalar við røktarfakligari útbúgving í starvsbrøki 1,0 at byrja 1. juni 2011 ella eftir nærri avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Ceciliu Vestureið, økisleiðara, tlf. 762100.
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, autorisation og CV verður at senda til:

**Heimatænastan Øki 1**
Stílað: Cecilia Vestureið, økisleiðara
Smyrilsvegur 13
FO-100 Tórshavn
naerverk@naerverk.fo

**Umsóknarfreist: 4. mai 2011.**

## Kostfakligur leiðari til Røktarheimið Hamragarð í Vági

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Røktarheimið Hamragarður í Vági at byrja 1. Juni 2011.

Arbeiðið fevnir millum annað um matgerð, tilrættalegging av matarskrá og innkeyp. Talan er um eitt starv, har tú fært møguleikan at vera við at uppbyggja og samansjóða tænastur.
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jastrid Nielsen, leiðara, á tlf 373907.

Umsókn saman við prógvi, og møguligum viðmælum verður at senda til:

**Heimatænastan**
Stílað: Jeanna í Lágabø, økisleiðari
Vágsvegur 45
900 Vágur

**Umsóknarfreist: 29. apríl 2011.**

Lesið meira á heimasíðu okkara: www.naerverk.fo / leys størv

**Les alla lýsingina á heimasíðu okkara**
**www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Søkt verður eftir elektrikara at byrja beinavegin.

Áhuga kunnu venda sær til elnet á telefon 284800

el | net
Tlf. 60 00 60 Løggildur el-innl.